# Landssjúkrahúsið – nýggi bygningurin

SJÓNARMIÐ
*A. Guttormur Djurhuus*



Herfyri lá eg á Landssjúkrahúsinum í nakrar dagar. Tú fær skjótt viðring fyri teimum fryntligu, dugnaligu og arbeiðssomu starvsfólkum sum har arbeiða, og er tað við takksemi at tú staðfestir at slík fólk eru til. Verri er við teimum ytri kørmum, sum tey arbeiða innanfyri, og skal eg siga nakað um tað. Og eisini nakað um karmin hjá sjúklinginum.

Snotiligur sær hann út uttanífrá, nýggi bygningurin á Landssjúkrahúsinum. Í útsjónd helst eitt av teimum frægu arkitektaavrikunum her á landi. Og kemur tú inn í forhøllina, er har ikki minni snotiligt og hugnaligt. So fasaduni móti umheiminum bagir einki.

**Tungt at halda reint**
Tíverri kann ikki sigast tað sama um stovurnar, sum sjúklingarnir liggja á. Ráðgevararokningarnar hava verið stórar, men neyvan hevur nøkur vaskikona, portørur, virkandi sjúkraøktarfrøðingur ella virkandi lækni verið millum ráðgevarnar. Tíverri er helst so at ein akademikari ikki spyr eina vaskikonu um nakað. Hvat skuldi hon vitað, sum ikki akademikarin veit? Jú, kanska kundi hon havt okkurt at sagt honum. Kanska okkurt um at krókar og skot eru ring at halda rein. At hill skal vera á baðrúminum at seta frá sær toilettgreiðirnar á. At tað er óheppið at brúka vindeygakarm til hill. At reingerð av lutum tú ikki røkkur er tvørlig og ikki uttan vanda. Sjónvørp eru hongd upp á veggin beint undir loftinum. Ikki er bert vónleyst at halda sjónvarpstólini rein, sum hanga uppi undir loftinum. Heldur ikki ber til at sjúklingur 1, og sjúklingur 2 hyggja eftir hvør síni rás. Mynd og ljóð fløkjast. So hví hava tvey sjónvørp? Eitt ófatuliga tápuligt hugskot! Og helst kundi tað verið so mangt annað, sum vaskikonan eisini kundi sagt arkitektinum.

Síðani Semmelweiss vísti á týdningin av reinføri á sjúkrahúsum, hevur stórur dentur verið lagdur á at halda reint, og sostatt halda nøgdina av mikrobum á einum so lágum støði sum gjørligt. Serliga týdningarmikið er tað blivið at halda reint, nú vit hava fingið multiresistentar bakteriur at stríðast við, og sum kunnu elva til sjúkrahússjúku. Tað er her vaskikonan kemur inn í myndina, sum hin helst týdningarmesti persónurin, men kanska hin minst virdi. Innrættingin sum heild ger arbeiðið hjá vaskikonunum tungt og trupult.

**Eittans baðrúm til fýra sjúklingar**
Í bygninginum eru m. a. stovur við tveim seingjaplássum. Í millum stovurnar er baðrúm við vesi. Tað merkir, at fýra sjúklingar eru um eittans baðrúm. Tað er ikki nøktandi. Sjúklingur kann av fleiri orsøkum hava brúk fyri at fara ofta í baðrúmið, og at kunna geva sær góðar stundir. Tað kann vera ringt um fýra sjúklingar skulu nýta sama rúm.

Portørarnir søgdu mær at tað var ikki lætt at koyra sjúklingarnar millum tær ymisku stovurnar og deildirnar til kanningar og annað. Fyri tað mesta restaði einir tveir tummar í til at kunna gera tað uttan ampa fyri sjúklingin og lættliga og skjótt fyri teir sjálvar.

**Flakavirkisreglugerð hevði kunna bøtt um innrættingina**
Tað kundi bøtt munandi um úrslitið um arkitektarnir høvdu hugt í eina fyriskipan um, hvussu eitt flakavirkið skal innrættast. Har hava vit neyva reglugerð. Hon kundi givi ábendigar um, hvussu tú innrættar fyri at tað skal vera lætt at halda reint og harvið minka um nøgdina av mikrobum. Eg ivist ikki í at teir kundu havt ognað sær reglugerðina fyri einki frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Spell at so einføld brek skulu skemma ein so stásiligan og dýran bygning.




# Bjarni Djurholm er fantastiskur

FINNUR HELMSDAL
tingmaður



Landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum seinastu 7-8 árini, Bjarni Djurholm, hevur seinastu tíðina prógvað til fulnar, at hann dugur og kann meira enn fólk flest. Seinastu vikurnar hevur hann almannakunngjørt ætlanir, sum gera okkum vanligu púra bilsin. Hann sigur, at hann ætlar at seta segl soleiðis, at føroyski arbeiðsmarknaðurin skal tillagast tørvinum hjá tí einstaka og ikki minst familjuni. Hetta er sami Bjarni Djurholm, sum ongantíð hevur hugsað tvey samanhangandi sekund um at sosialisera nakað sum helst. Og hetta er sami Bjarni, sum setti landsstýrismannin í innlendismálum í svára knípu, tí hann lat honum eina Matrikulstovu við mest asosiala og harðrenda starvsfólkapolitikki, sum sæddur er á hesum leiðum.

Hvør minnist ikki, hvussu trý starvsfólk á Matrikulstovuni fingu durafjórðingin, tí tey ikki vóru 100%. Hetta hóast tey høvdu millum langan og heilt langan starvsaldur. Men Bjarni slapp undan at standa til svars, tí løgmaður lovaði nakað, sum hann ongan tíð ætlaði at halda. Og so kundi Bjarni yppa øksl, hann visti at vinurin Jóannes altíð var til reiðar at verja hann. Og nú ætlar sami landsstýrismaður at humanisera og sosialisera arbeiðsmarknaðin. Hann fer at seta ein arbeiðsmarknaðarkommissión, sum bæði skal uppfinna djúpa tallerkin og siggja ljósið. Sjálvandi ein ballón undan løgtingsvalinum, sum Bjarni tá nokk roknaði við fór at verða skrivað út hvørja løtu. Men tak kollfirðingin, hann fekk útvarpið at hava samrøður og annars fleiri umrøður av ballónini (kommissiónini).

Bjarni royndi eisini at senda aðrar ballónir upp um sama mundi. Um yvirtøku av luftrúminum, og við at blæsa luft aftur í granskingarparkina. Útvarpið beit eisini á, tí tað gera teir hvørja ferð, Bjarni Djurholm lættir sær á hina liðina. Uttan ein kritiska spurning, uttan ein einasta kritiskan spurning, nei mikrofonin verður tendrað, og tosa so... Hetta kann undra, tá aðrir politikarar verða tráspurdir, saman- og sundurkliptir og avvístir við orðum sum: "Anstøðan kemur við so nógvum...".

**Flogvallarmálið**
Nú hevur mangur undan mær skrivað og sagt júst somu orð um Bjarna Djurholm og Útvarpið. Og júst somu orð um Hans Paula Strøm og Útvarpið. Tí nógv eru veruliga frustrerað og kedd um og av, at alment fíggjaður miðil kann loyva sær at vera so einvísur og út um alt mark tendensiøsur. Men tað nyttar helst einki at siga ella skriva so nógv um hesi viðurskifti, tí tað verður bert ein sjálvur, sum rindar prísin. Tí skal eg heldur ikki dvølja meira við slíkt, sum bert ger ein til eitt grenj í fólkaeygum. Orsøkin til at hetta bræv yvirhøvur varð byrjað, er tað sum Bjarni Djurholm í hesum døgum sigur um flogvallarmálið. Jóannes Eidesgaard hevur sum løgmaður gingið dønum til handa, bæði beinleiðis og óbeinleiðis. Eitt dømi um hetta er, at hann hevur góðtikið, at danir gera sína skyldu í flogvallarmálinum fyri pening, sum skal nýtast til onnur endamál - í Føroyum. Flogvøllurin í Vágum skal útbyggjast fyri millum 4 og 500 milliónir, hesa útbygging eiga danir at gjalda, tí teir hava og hava havt flogvøllin sum sítt málsøki.

Danir hava síðan eina ferð í 70'árunum (og tað er prógvfast) sýtt fyri at dagføra sínar ognir og skyldur í Føroyum. Teir vildu tí heldur ikki dagføra flogvøllin, áðrenn hann bleiv yvirtikin. Tí segði løgmaður ja til, at flogvallardagføringin verður rindað úr 60 milliónа grunninum, sum varð stovnaður 1963 við tí endamáli at menna tann partin av samferðslunetinum, sum tá var føroyskt málsøki. Hetta vístu andstøðutingmenn á, tá dagføringin av flogvøllinum í Vágum var fyri á tingi, men samgongan samtykti málið - 100% samd. Bjarni Djurholm hevði fleiri ferðir orðið undir viðgerðini, og hálovaði hann loysnini, sum løgmaður hevði latið seg lokkað til av donskum embætismonnum.

Ein frágera góð, ein skilagóð, ja, optimala loysnin segði Bjarni Djurholm, samstundis sum hann háðaði Tjóðveldisflokkin, sum sambært honum einki hevði megnað at yvirtaka (tað er annars próvfast, at nógv tær kostnaðarmestu yvirtøkurnar eru framdar, meðan Tjóðveldisflokkurin hevur verið landsstýrisflokkur). Men nú kemur røringur í, tí onkur fólkaflokstingmaður heldur ikki loysnina við dagføringini av flogvøllinum í Vágum vera só góða allíkavæl. Hesin sigur við Vinnuvitan, at vit heldur skulu gera ein altjóða flogvøll upp á minst 2200 metrar, og eri eg als ikki ósamdur við sama fólkafloksmanni í hesum, hetta av fleiri orsøkum, ikki minst við vinnu- og útflutningsmenning fyri eyga. Og tá tað ikki er pláss fyri so langum vølli í Vágum, er úrslitið, at hann skal leggjast aðrastaðni.

Sjálvandi fær fólkaflokstingmaðurin reaktiónir, fyri men kanska mest ímóti, tí tað gevur helst meira.

Politiski veðurhanin hjá Djurholm er ikki so óeffin, tí hann er skjótur úti og sigur, at vit skulu dagføra flogvøllin í Vágum, og vit skulu eisini gera ein altjóða flogvøll. Eg endurtaki orðini hjá Djurholm: Vit skulu dagføra flogvøllin í Vágum, og vit skulu gera ein altjóða flogvøll (onkur iðrar seg kanska um, at hann ikki kom við einum triðja uppskoti).

Tá føroyska a-landsliðið skoraði góð ella avgerandi mál, plagdi Jógvan Arge at siga "fantasktiskt" upp á ein sovorðnan máta, at ein kendi tað, sum kom orðið innan úr innastu krókunum. Havi hug at royna at siga orðið fantastiskt á sama hátt sum Jógvan, men tað klári eg sjálvandi ikki. Men orðið fantastiskt er orðið, og bert tað. Bjarni Djurholm er fantastiskur. Tí hann megnar, sum eingin annar, at velja ikki bara báðar, men allar tær loysnir, sum hann heldur ella veit fólk vilja hava. Vit plaga at siga, tá so er, at hasin maðurin hevur fleiri tungur í sama heysi. Men vit eru helst noydd at siga okkurt annað um Bjarna Djurholm. Tí væl útbúgvin og annars skilagóð fólk í Útvarpinum siga, at Bjarni er fantastiskur, og tí er hann fantastiskur.

Haldi eg tori at siga, at Bjarni Djurholm og Hans Pauli Strøm er komnir væl áleiðis at umkalfatra Útvarpið soleiðis, at tað mest av øllum minnir um eina veðurstøð.